# Høvuðsstaðurin á talentveiðu

**Borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu hittir føroyingar í Bretlandi, tá útisetakanningin verður viðgjørd í London fríggjakvøldið**

FØRLEIKI UTTANLANDS

*Tíðindaskriv*



*Heðin Mortensen skiftir orð við útisetar í Keypmannahavn á ráðstevnu á Christianborg fyrr í ár*

Tórshavnar Kommunan arbeiðir við eini stórari ætlan, sum skal skapa nýggj arbeiðspláss og fleiri skattakrónur og harvið styrkja trivnaðin og vælferðina í kommununi og landinum sum heild.

Ásannandi, at nýggjar og globaliseraðar tíðir krevja nýggjar og globaliseraðar strategiir, arbeiðir kommunan saman við vinnuni, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og vitanarstovnum miðvíst við at gera høvuðsstaðin enn meira dynamiskan, so hann gevur teimum, sum longu búgva her, góðar umstøður at arbeiða og stovna virksemi, samstundis sum hann megnar at draga talentini til sín uttan úr heimi.

Kommunan hevur sett sær fyri at kappast við útlendsku metropolarnar um at ta best útbúnu arbeiðsmegina og um talentini við teimum bestu royndunum og størstu drívmegini. Evnini at kappast á altjóða marknaðunum gerast alsamt meira tengd at dagførdari vitan, nýggjum hugskotum og góðum skapanarevnum. Hetta krevur fólk við nógvum ymiskum førleikum. Kommunan vil hava fatur á so nógvum borgarum, sum tilber, ið kunnu verða við til at menna nýtt vinnulív og skapa nýggj arbeiðspláss.

Nógv teirra trívast best í dynamiskum stórbýum. Hóast føroyski høvuðsstaðurin er ein Dávid móti Goliath í kappingini um talentini, so metir kommunan ikki, at tað slepst undan at taka kappingina upp við Keypmannahavn, Århus, Stockholm, Reykjavík, London og aðrar metropolar, har nógvir føroyingar trívast og hava góðar yrkisleiðir.

Eins og góðar kreftir heima eru tær skapandi kreftirnar millum útisetarnar týdningarmiklir leikarar í hesum høpi. Kanningarnar vísa, at nógv teirra ikki ynskja at flyta heimaaftur. Serliga kvinnurnar, tey sjálvstøðugt vinnurekandi og fólk í privatu vinnuni annars hveppa seg við at flyta heim. Tey flestu, sum umhugsa at flyta aftur til Føroyar, vilja bert búgva í høvuðsstaðnum.

Tórshavnar Kommuna hevur tí verið við til at skipa fyri JobMatch á Norðurbryggjuni og teimum báðum útisetakanningunum í ávikavist Keypmannahavn og London.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, fer saman við øðrum, sum samskipa vakstrarætlanina hjá høvuðsstaðnum, at tosa við útisetar í London, tá úrslitini frá útisetakanningini verða løgd fram har fríggjakvøldið, eins og tey vóru, tá samsvarandi danska kanningin varð løgd fram á Christiansborg fyrr í ár. Heðin Mortensen verður eisini høvuðsrøðari á tiltakinum í London.

## Nýggj útisetakanning »Førleiki í útlegd«

ÚTBÚGVING

*Tíðindaskriv*

Útisetakanningin »Førleiki í útlegd« verður nú almannakunngjørd. Tað er Sendistovan í London og Tórshavnar Kommuna, sum í felag hava tikið stig til at lata hesa kanning gera. »Førleiki í útlegd« er útisetakanning, sum viðgerð hugburðar, samleikar og framtíðarætlanir hjá føroyskum útisetum í Bretlandi. Higartil hava upplýsingar um føroyingar uttan fyri Føroyar verið so fáar, at ábendingar sum henda kanning kann geva, eru áhugaverdar.

Endamálið við kanningini var fyrst og fremst at fáa til vega vitan um føroysk lesandi uttanlands og útisetum sum heild. Og síðani at varpa ljós á hvørja fatan lesandi og útisetar hava av føroyska vinnulívinum og samfelagnum sum heild. Kanningin leggur serligan dent á at lýsa hvørjar høvuðsorsøkir eru til, at summir føroyingar ikki hava ætlanir um, ella hug til, at flyta aftur til Føroya eftir at hava búð uttanlands í eina tíð, og hví aðrir ætla at flyta heimaftur.

Ein av niðurstøðunum er, at hugburðurin viðvíkjandi framtíðarætlanum hjá útisetum er merktur av tvílyndi. Útisetar síggja bæði fyrimunir og vansar við at búgva í Føroyum. Sum heild verða Føroyar mettar at vera eitt lokkandi stað at búgva, men hinvegin minni lokkandi fyri tey, sum eru framsøkin viðvíkjandi yrkisleið. Ábendingar eru eisini um at manglandi samskifti og kunning um vinnumøguleikar í Føroyum eru orsøkin til hesa fatan av vantandi starvsmøguleikum í Føroyum.

Til tess at kunna um vinnumøguleikarnar í Føroyum hevur Sendistovan í London saman við Vinnuhúsinum, MFS og Stuðulsstovninum sett á stovn eina yrkistænastu, eitt sokallað »careers service«, í Føroyum. Tænastan skal betra um samskiftið millum útbúnar føroyingar og føroyskt vinnulív og vísa á teir møguleikar sum eru á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Útisetakanningin hevur haft breiða undirtøku og stóran áhuga ímillum viðkomandi áhugapartar. Kanningin er stuðlað av m.ø. Vinnuhúsinum, Mentamálaráðnum, Eik, Stuðulsstovninum, Meginfelag Føroyskra Studenta, Føroyingafelagnum í London og Atlantic Airways.

Í sambandi við, at kanningin verður almannakunngjørd skipar Sendistovan í London fyri lestrartiltaki í London har ið samfelagsfrøðingurin Rógvi Absalonsen, sum stóð á odda fyri kanningararbeiðinum, luttekur saman við Heðin Mortensen, borgarstjóra í Tórshavnar Kommunu.

Kanningin »Førleiki í Útlegd« er tøk á www.mfa.fo

# Múgvandi kvinna skal umsita norsku fiskivinnuna

**Lisbeth Berg-Hansen, sum fyrr í vikuni bleiv tilnevnd fiskimálaráðharri í Noregi, hevur drúgvar royndir í vinnuni, og hon hevur eisini fingið væl burturúr**

NOREG

*Árni Joensen*

*arni@sosialurin.fo*



*Tann 46 ára gamla Lisbeth Berg-Hansen hevur fyrr verið ráðgevi í fiskimálaráðnum og skrivari í forsætismálaráðnum*

*Mynd: Aftenposten*

Tað kom ikki óvart á norðmenn, at Jens Stoltenberg valdi ein nýggjan fiskimálaráðharra, nú stjórnin bleiv umskipað aftan á valið herfyri. Tað kom heldur ikki óvart á nakran, at hann aftur valdi eina kvinnu at umsita fiskivinnuna.

Men kortini slær Finansavisen fast, er tann nýggi ráðharrin, Lisbeth Berg-Hansen, ikki sum hini í stjórnini. Hon hevur havt fleiri álitisstørv í vinnuni, og so hevur hon ognir, hvørs virði sambært almennum upplýsingum liggur um 50 milliónir norskar krónur. Metingin hjá Finansavisen er grundað á tað, sum Lisbeth Berg-Hansen eigur í norðurnorsku alifyritøkuni Sinkaberg Hansen AS og úrslitunum, sum fyritøkan hevur havt tey seinastu árini. Fyritøkan, sum hevur 141 fólk í arbeiði, hevði 25 milliónir krónur í avlopi í fjørv og eina eginogn oman fyri 200 milliónir krónur.

Millum álitisstørvini hjá Lisbeth Berg-Hansen er ein nevndarsessur í Aker Seafoods. Men alt hevur ikki við fiskivinnuna at gera, tí ráðharrin er eisini nevndarlimur í hjálparfelagsskapinum SOS-Barnebyer Norge. Hon er heldur ikki tann einasti ráðharrin har, tí tann nýggi fíggjarmálaráðharrin, Sigbjørn Johnsen, er eisini nevndarlimur í SOS Børnebyer Norge.